# Føroyskt til Margrethu

Krúnprinsaparið og Drotning Margretha fara saman við Heindriki prinsi til Grønlands á vitjan í næstum. Í hesum sambandi er inspektiónsskipið Thetis á veg til Grønlands. Skipið fór úr Føroyum í gjár tann 28. juni. Í lastini hevur Thetis føroyskan fisk frá Nevið Fiskeeksport i Rúnavík. Hesin fiskur er ætlaður kongligu gestunum, sum skulu umborð á Thetis undir almennu vitjanini í Grønlandi. Á matkortinum verður millum annað grillaður kalvi til Mary, Fríðrik, Heindrik, og Margrethu.

**-hkm**

# Jazzur á Verthúsinum

JAZZUR
*Tíðindaskriv*

Hesa vikuna er Jazzstevna í Havn, og Vertshúsið verður sera aktivt. Umframt ymisk tónleikatiltøk á Vertshúsinum fer James Olsen sum vocalistur at luttaka við House Bandinum á fasta jamminum Mikukvøldið.

Á Vertshúsinum harmast tey um, at tey ikki sleppa at skeinkja øl uttanfyri. Tað ber ikki til, tí tað er ikki loyvt í Føroyum.

Gjaldsskipanin í Vágatunlinum:

# Nú skal loysnin finnast

**P/f Vágatunnilin og p/f norðoyatunnilin hava havt aðalfund. Á fundinum kom millum annað fram, at vágatunnilin gjørdist dýrari enn ætlað, og at tað nú ikki kann væntast at ganga long tíð, áðrenn ein loysn verður funnin á trupulleikanum við gjaldstøðini**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Mánadagin 21. juni vóru aðalfundir í báðum tunnilsfeløgunum. Nevndirnar løgdu fram ársfrágreiðing og ársroknskap, eins og nevnd skuldi veljast. Eisini var landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm tilstaðar. Hann dró serliga tvey ting fram á fundinum.

Annað var, at gjaldsskipanin í tunlinum hevur als ikki virkað, síðani tunnilin lat upp, og tað fíltist landsstýrismaðurin sum partaeigari á.

Bergur í Garði, nevndarformaður ásannar, at skipanin hevur als ikki verið nøktandi, men hann sigur samstundis, at tað verður arbeitt við fullari kraft at finna eina loysn.

Sambært Bergi kann ein av trupulleikunum vera, at tá felagið frá fyrstan tíð gjørdi av, at støðin skuldi vera ómannað, at teir vóru heldur frammarlaga.

– Vit nýttu eitt mynstur, sum er kent úr Noregi, men um hugt verður at støðuna í Noregi í dag við gjaldsstøðum, so vísir hon, at av teimum umleið 60 ella 70 støðunum, eru bert fimm ella seks ómannaðar, greiðir Bergur frá.

Skipanin við kubbunum hevur virkað, sum hon skal, men tað er kortskipanin, sum ikki hevur virkað.

Bergur í Garði sigur, at ítøkilig stig eru nú tikin til tess at finna eina loysn á trupulleikanum.

Hann greiðir frá, at norski veitarin hevur sett seg saman við einum veitara úr Føroyum fyri at projektera eina loysn. Og tað kann verða talan um, at støðin fer at verða mannað framyvir.

Nær loysnin verður klár, veit hann tó ikki at siga við vissu, men hann væntar, at tað kann verða skjótt.

## Dýrari tunnil

Hitt, sum landsstýrismaðurin førdi fram er, at Vágatunnilin, nú endaligi byggiroknskapurin er liðugur, kostaði 37 milliónir meira enn upprunaliga ætlað.

Eitt tal, sum hevur verið nógv frammi í sambandi við samlaða kostnaðin av tunlinum, er 240 milliónir, men í endaliga byggiroknskapinum er talið góðar 300 milliónir.

– Sjálvur tunnilin er vorðin um 37 milliónir krónur dýrari. Restin eru kapitalútreiðslur, rentuútreiðslur og útreiðslur av felagnum, greiðir Bergur á Garði, nevndarformaður í feløgunum báðum.

Byggiroknskapurin varð formliga handaður vinnumálastýrinum til viðgerðar á fundinum. Tá hann er viðgjørdur, fær p/f Vágatunnilin aftursvar frá vinnumálaráðnum.

Nevndarval var eisini á skránni á fundinum.

Í nevndina fyri Vágatunnilin p/f vórðu afturvaldir Bergur í Garði, Jens Kári Vilhelm, Oyvindur Brimnes og Bjarni A. Bjarnason meðan Dánjal Thomsen varð nývaldur.

Í nevndina fyri Norðoyatunnilin vórðu afturvaldir Bergur í Garði, Jens Kári Vilhelm, Heri M. Hammer, Oyvindur Brimnes og Bjarni A. Bjarnason.

Nevndirnar skipa seg á nevndarfundi í komandi viku.

# Ferðsluóhapp í Hoyvík

Leygardagin hendi eitt ferðsluóhapp á Hvítanesvegnum. Ein ungur maður hevði stolið bilin, og hann var ávirkaður av rúsdrekka. Umframt hetta hevði bilførarin ikki koyrikort.

Førarin varð fluttur á skaðastovuna, men hann var skjótt útskrivaður, tí hann hevði ikki fingið nakran álvarsligan skaða.

– Vit hava tikið mannin, og hann verður nú skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring og innbrot í bil. Hann hevði roynt at stolið ein annan bil frammaundan, sigur vakthavandi á løgreglustøðini, sum annars leggur afturat, at vikuskiftið hevur verið sera friðarligt í høvuðsstaðnum.

**- sae –**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 27, 2004
www.kaupthing.fo

# Bumbubrestir skakaðu lánsbrøvini

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var sum heild friðarlig á heimsins virðisbrævamarknaðum, men hósdagin brustu tvær bumbur í Turkalandi og yvirgangur varð framdur í Irak. Hesar hendingar órógvaðu friðin á marknaðunum og lánsbrævarenturnar lækkaðu sum heild. Partabrøvini lótu seg tó ikki ávirka av hendingunum.

Orsøkin til at lánsbrøvini, og ikki eisini partabrøvini, órógvaðust er teknisk. Íleggjarar í hópatali mangla í løtuni lánsbrøv (á fakmáli kallast hetta, at teir eru "stuttir"), og tá órógv kemur á marknaðin leypa slíkir íleggjarar aftur í marknaðin og keypa lánsbrøvini teir vanta. Tískil fáa hendingar, eins og tær í Turkalandi og Irak, stundum stóra ávirkan.

Í farnu viku varð eisini búskaparvøksturin í USA í 1. ársfj. dagførdur úr 4,4% í 3,9%. Talið var kortini hampuligt og gevur ábendingar um, at vøksturin fyri alt 2004 verður 4,6% sammett við 3,1% í 2003. Meira áhugavert var, at prísvakstraruppgerðin hjá stjórnini, ið varð kunngjørd samstundis, vísti ein vøkstur úr 2,6% í 2,9%. Hetta fekk lánsbrævarenturnar at hækka aftur eftir lækkingina, ið stóðst av bumbubrestunum .

Serliga prísvakstraruppgerðin staðfesti metingina hjá Kaupthing um, at FED fer at hækka leiðandi rentu teirra á fundi mikudagin 30. juni úr 1,00% í 1,25%. Fundurin verður stórhendingin hesa vikuna og hendingin fer at hava stóra ávirkan á, hvussu heimsins fíggjarmarknaðir fara at hátta sær komandi vikurnar. Lítil ivi er um hvat FED fer at gera, og tí verður týdningarmiklast, hvat stjórin Alan Greenspan fer at siga í samband við rentufundin. Eisini evropiski miðbankin hevur fund hesa vikuna, men Kaupthing metur ikki, at tey fara at broyta teirra rentustig.

Vit meta at Greenspan fer at endurtaka, at rentan verður hækkað hóvliga í tráð við búskapargongdina, og at hann ikki sær vandan í ógvusliga hækkandi prísvøkstri. Kortini kann vikan gerast óstøðug, tí marknaðirnir fara at venda hvørjum orði Greenspans og eisini tí at fleiri týdningarmiklar búskaparkunngerðir koma, m.a. stóra arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,76% | -0,08% |
| 5 ára lánsbræv | 3,87% | -0,05% |
| 10 ára lánsbræv | 4,49% | -0,03% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 263,5 | 0,5% |
| OMX, Svøríki | 696,2 | 2,3% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.824,9 | 0,3% |
| S&P 500, USA | 1.134,4 | 0,4% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,37 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 165,28 | 0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 79,57 | 1,7% |
| Altjóða Vøkstur | 64,51 | 0,5% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 611,00 | -0,4% |
| EUR | 743,25 | 0,0% |
| GBP | 1.115,86 | -0,7% |
| NOK | 89,46 | 0,7% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*




**Húsarhaldsskúli Føroya søkir**

# lærara (avloysara)

Søkt verður eftir einum føðslu- og húsarhaldsfrøðingi at undirvísa fulla tíð ítíðarskeiðnum 01.08.04-31.02.05.

**Starvið fevnir um:** Undirvísing í matgerð, kostlæru, vørukunnleika, reinføri o.ø. og annars at vera við til at fyriskipa ymisk tiltøk á skúlanum.

**Vit kundu hugsa okkum:** Lærara ið dugir at samstarva, er fyrikomandi, hevur áhuga at arbeiða saman við ungdómi og sum annars hevur hug at seta sín dám á skúlan.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu hava úbúgving sum føðslu- og húsarhaldsfrøðingur ella líknandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti:** Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18,1-27,4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Fyrispurningar:**
Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú venda tær til leiðaran á skúlanum Jóhonnu á Tjaldrafløtti.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. juli 2004.

HSF
**Húsarhaldsskúli Føroya**
Stoksoyrarvegur 29 · 700 Klaksvík
tlf. 456974/216974 · fax 457664
teldupostur: hsf@post.olivant.fo



# TILBOÐ

**Galdandi til 10. juli**
**- ella so leingi vøra er á goymslu**



**GOSBAÐ**
- Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
- Veitingartíð 4-6 vikur

vanligur prísur 11.498,-
**BERT 8.598,-**
**spar 2.900,-**



**DAMP MASSAGUKABINA**
- Við fótmassagu, digitalari dampstýring, radio og ljósterapi.
- Mál: 83 x 118 cm

vanligur prísur 27.298,-
**BERT 19.998,-**
**spar 7.300,-**



**HVÍTT BAÐIRÚMSMØBIL**
- Við handtøkum, vaski, spegli og ljósi, men uttan blandingsbattarí.
- Verður latið samlað

vanligur prísur 7.098,-
**BERT 3.898,-**
**spar 3.200,-**

**damor**
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001



B R Ú K T I R B I L A R F R Á

# BERG MOTORS

| | |
|---|---|
| **MAZDA 323 1.5i GLX** Brúnur · 4 hurðar · 5 gear · km. 56.000 · árg. jun 98 · sýnaður nov 03 | **Kr. 76.000,-** |
| **MAZDA 323 P 1.3i LX H/B** Grønur · 3 hurðar · 5 gear · km. 110.000 · árg. apr 97 · sýnaður feb 04 | **Kr. 65.000,-** |
| **MAZDA 323 1.3i LX** Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 106.000 · árg. apr 99 · nýsýnaður | **Kr. 80.000,-** |
| **MAZDA 323 S 2.0 Diesel LX** Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 60.000 · árg. sep 99 · sýnaður mai 04 | **Kr. 115.000,-** |
| **MAZDA 323 S 2.0 Diesel LX** Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 150.000 · árg. jun 98 · sýnaður nov 03 | **Kr. 132.000,-** |
| **MAZDA 626** Gráur · 4 hurðar · 5 gear · km. 102.000 · árg. okt 98 · sýnaður okt 03 | **Kr. 95.000,-** |
| **MAZDA 626 1.8i LX** Svartur · 4 hurðar · 5 gear · km. 176.000 · árg. sep 92 · sýnaður okt 03 | **Kr. 55.000,-** |
| **MAZDA 626 2.0 Sedan GLX** Grønur · 4 hurðar · 5 gear · km. 79.000 · árg. jul 92 · sýnaður mai 04 | **Kr. 45.000,-** |
| **MAZDA 626 GLX 2.0 DiTD Diesel** Grønur · 5 hurðar · 5 gear · km. 167.000 · árg. jul 00 · sýnaður mai 04 | **Kr. 128.000,-** |
| **MAZDA Demio 1.5 GLX** Grønur · 5 hurðar · 5 gear · km. 112.000 · árg. jan 99 · sýnaður mai 04 | **Kr. 75.000,-** |
| **MAZDA Premacy 2.0 TurboDiesel** Reyður · 5 hurðar · 5 gear · km. 78.000 · árg. feb 01 · sýnaður jul 04 | **Kr. 139.000,-** |
| **BMW 320i** Svartur · 4 hurðar · 5 gear · km. 116.000 · árg. okt 92 · sýnaður jan 04 | **Kr. 90.000,-** |
| **CITROEN ZX 1.4i** Gráur · 2 hurðar · 5 gear · km. 95.000 · árg. sep 96 · sýnaður mai 04 | **Kr. 57.000,-** |
| **CITROEN ZX 1.9D Stationcar Diesel** Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 130.000 · árg. okt 96 · sýnaður jan 04 | **Kr. 65.000,-** |
| **FORD Escort 1.6** Reyður · 5 hurðar · 5 gear · km. 65.000 · árg. jun 95 · sýnaður mai 04 | **Kr. 53.000,-** |
| **FORD Escort 1.8 Diesel Stationcar** Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 132.000 · árg. des 95 · sýnaður mar 04 | **Kr. 45.000,-** |
| **FORD Fiesta 1.8 Diesel** Bláur · 3 hurðar · 5 gear · km. 104.000 · árg. apr 91 · nýsýnaður | **Kr. 25.000,-** |
| **FORD Mondeo H/B** Gráur · 5 hurðar · 5 gear · km. 153.000 · árg. sep 96 · sýnaður mai 04 | **Kr. 56.000,-** |
| **HONDA Civic 1.4i S** Gráur · 5 hurðar · 5 gear · km. 65.000 · árg. 98 · sýnaður nov 03 | **Kr. 90.000,-** |
| **KIA Sephia 1.5i GLX** Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 70.000 · árg. mai 98 · sýnaður nov 03 | **Kr. 57.000,-** |
| **NISSAN Primera 2.0D SLX Diesel** Hvítur · 4 hurðar · 5 gear · km. 188.000 · árg. apr 95 · sýnaður feb 04 | **Kr. 59.000,-** |
| **OPEL Astra 1.6** Beige · 4 hurðar · 5 gear · km. 111.000 · árg. mar 98 · sýnaður feb 04 | **Kr. 60.000,-** |
| **OPEL Astra 1.6i Station Car** Grønur · 5 hurðar · 5 gear · km. 49.000 · árg. apr 01 · sýnaður jun 04 | **Kr. 128.000,-** |
| **OPEL Astra 1.7 Diesel Station Car** Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 170.000 · árg. feb 92 · nýsýnaður | **Kr. 35.000,-** |
| **OPEL Vectra 2.0 DITD STW** Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 105.000 · árg. des 99 · nýsýnaður | **Kr. 140.000,-** |
| **SUZUKI Baleno 1.6i GLX** Grønur · 4 hurðar · 5 gear · km. 49.000 · árg. feb 00 · nýsýnaður | **Kr. 95.000,-** |
| **TOYOTA Avensis 1.8 terra Station** Gráur · 4 hurðar · 5 gear · km. 86.000 · árg. mar 99 · sýnaður sep 03 | **Kr. 130.000,-** |
| **TOYOTA Corolla 1.3i LX** Gráur · 4 hurðar · 5 gear · km. 84.000 · árg. feb 98 · nýsýnaður | **Kr. 80.000,-** |
| **VØRUVOGNAR** | |
| **MAZDA B2500 std cab** Hvítur · 2 hurðar · 5 gear · km. 25.000 · árg. apr 99 | **Kr. 90.000,-** |
| **MAZDA B2500 4x4 StrechCab Turbo** Bláur · 2 hurðar · 5 gear · km. 25.000 · árg. mar 02 | **Kr. 170.000,-** |

**BERG MOTORS**
STARAVEGUR 1-3 • TEL 31 35 35 • FAX 31 77 35 • WWW.BERGMOTORS.FO

Sosialurin 341800



# Sands skúli

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2004/2005:

**1 lærarastarv vegna avlopstímar, uml. 12 t./v.**
**1 ped.stuðul til næming við serligum tørvi í 1. flokki, 15 t./v.**

Størvini eru tíðaravmarkað skúlaárið 2004/2005.

1 starv er lønt eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

1 starv er lønt eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 10. juli 2004.

**Sands skúlastýri**
v/ Jóhan Petur Kj. Hentze
FO-210 Sandur



# Lærari til Viðareiðis skúla

Komandi skúlaár 2004-2005 tørvar okkum 1 lærara at undirvísa umleið 4-6 tímar um vikuna, vegnað avlopstímar.

Starvið verður lønt smb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja er úti á middegi 12. juli 04.

Umsókn og møgulig viðmæli skulu sendast til:

**Viðareiðis Skúlastýri**
v. Lenu Heinsen
FO-760 Viðareiði



# Gør et kup

10 år gammel Entreprenørfirma sælges for 1/3 af dagsværdi.

**Tlf. 581454**


Sosialurin